# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 29.okt. 2018<br>Tíð:kl 16.00 – 18.00 | Luttakarar: Allan, Bergunn, Jóhan, Súsanna, Bjørghild og Marjun<br><br>Ikki møtt:Vivian | |
|---|---|---|

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin varð undirskrivað. | AM |
| 2. | Evnisdagur um endurnýtslu | Tveir dagar um endurnýtslu.<br>Skúlin er so heppin at hava fingið 75.000 frá Tórshavnar kommunu til eina verkætlan, har skúlin fer undir at skilja rusk.<br>Í samband við at spannirnar skulu takast í nýtslu mánadagin tann 5.november er ætlanin at hava tveir evnisdagar um endurnýtslu hósdag og fríggjadag í viku 45.<br>Eitt av aðalmálinum er eisini at  at endurnýta burtur kast, fyri at gerast varugur við ovurnýtslu. Annað málið er at fáa evnað nakað kreativt. | MH |
| 3. | ICDP ein frágreiðing og felags foreldrafundur. | Teir tríggir lærarnir Juanita, Elin og Mariann komu á fundin fyri at greiða frá, hvat professionel relatónsførleikar er ella ICDP.<br>Tær umboða hvør sína deild og hava verið á tveimum vár- og heysthálvum hjá Anne Linder í ICDP,<br>Tær greiddu frá amboðum tey hava fingið í amboðskassan í samband við ICDP.<br>Anne Linder hevur boða frá at hon kann koma at halda ein fyrilestur fyri foreldrum mánadga tann 19.nov kl 19.00. Fyrilesturin tekur áleið 1 tíma og eitt korter og prísurin er 5000,- kr.<br>Hetta verður sæð sum ein styrkjandi liður í mun til tað menningararbeiði skúlin er farin undir í samband við professionellar relatiónsførleikar. | Joanita, Mariann og Elin |
| 4. | Uttanduraøkið | Allan hevur sent eitt skriv inn til kommununa um uttanduraøkið tann 11.juni 2018. 21.sept kemur svar frá kommununi aftur, at tað eru ikki meira peningur enn tað sum er játtað fyri hetta fíggjarárið 2018 168.000 kr.<br>Tað verður ikki svara uppá setta spurningin í aftursvarinum frá kommununi. Allan vendir aftur og fer at biða | AM |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | um svar uppá spurningin um tað sum lovað var á fundi 29.nov 2017.<br>Marjun hevði skriva teldupost um sama evni 18.apríl 2018. | |
| 5. | Kioskin í Steinatúni | | Ein dagin ringdu tey frá kommununi og spurdu um skúlin var áhugaður í kioskini í Steinatúni, tí hon skuldi beinast burtur sum skjótast.<br><br>Vit svaraðu ja, tí alt sum hendur á garðsøkinum er ein bati. Hava tosa við húsavørðanar um at leiða el út í smáttuna, so til ber at hita hana. Vóna at hon kemur úr fyri desembur, soleiðis at vit kunnu inn-rætta hana til eitt jólahús.<br><br>Vit hava sent ein fyrispurning inn til kommununa um at arkitekturin hjá teimum kemur viðm eini vegleiðing um hvar er best at seta hana við atliti til nýtslu og høvuðsbygningin. | MH |
| 6. | Kunning | | 6 og 7 flokkarnir fara at kappast í FLL, so tað eru nógv lið teknaði til.Nú verður roynt í ár at melda fleiri lið til, so tað fæst at vita hvør í veruliga er áhugaður í at halda áfram tey komandi árini.<br><br>Leygardagin tann 10.nov. verður kappingin uppi í Føroya Tele, tey byrja tíðliga á morgni.<br><br>Evið hesuferð er rúmdin. | |
| 7 | Ymiskt | | Tosað bleiv um felags foreldrafundin sum skal verða 19.nov kl 19.00. Ætlanin er at fáa so nógv fólk sum gjørligt, tí tað eisini hevur týdning at forel-dur verða kunnaði um ICDP.<br><br>Foreldraumboðini skulu syrgja fyri kaffi og kakum í kafeøkinum hetta kvøldið. | |